1

# Avtala sambært § 2 í sáttmálanum millum Meginfelag Sjúkrakassa Føroya og Kommunulæknafelag Føroya

§ 1

Henda avtala er gjørd sambært galdandi sáttmála millum Meginfelag Sjúkrakassa Føroya (MSF) og Kommunulæknafelag Føroya (KLF) frá 1. oktober 2006 (Sum Heilsutrygd hevur yvirtikið pr. 1. januar 2010). Víst verður til § 2.

Nýggj skipan er nú gjørd fyri innkeyp av umvavi. Nýggja skipanin kom í gildi 1. februar 2011. Smb. hesi skipan keypa kommunulæknarnir alt tilfar til umvav frá goysmluni á Landssjúkrahúsinum. Goymslan sendir faktura til Heilsutrygd. Sum ein fylgja av hesum, er Umvav slettað sum vøruheiti í Cosmic.

Porto tá smear og blóðprøvar skulu sendast til kanningar, hevur áður verið innroknað í Umvav.

§ 2

Framyvir verður porto innroknað í takstirnar fyri 2101, 2102 og 8151. Hesir takstir verða tí broyttir soleiðis:

| | Galdandi takstur til 28.02.2011 | Takstur frá 01.03.2011 |
|---|---|---|
| 2101 | 44,34 kr. | 20,00 kr. hægri enn galdandi takstir |
| 2102 | 31,67 kr. | 30,00 kr. hægri enn galdandi takstir |
| 8151 | 44,34 kr. | 20,00 kr. hægri enn galdandi takstir |

Hækkaðu takstirnir eru til tíðarnýtslu til centrifuging, útreiðslur til frakt og postgjald, reingerð og einnýtisútgerð til GU.

§ 3

Áður gjørd § 2 avtala um 2102 fer við hesi avtalu úr gildið

§ 4

Avtalan kemur í gildið 1. mars 2011.

Tórshavn tann 31. mars 2011

**Samstarvsnevndin**

MAS

v/ Samstarvsnevndina
Margit Stórá, forkvinna

| | | |
|---|---|---|
| Margit Stórá, forkvinna | Jaspur Petersen | Katrin Gaard |
| Sten Larsen | Andor Ellefsen | Jan Danielsen |